# 50 violinir í Vesturkirkjuni



*Herfyri varð stór konsert við susukuspælarum í ráðhúsinum í Gentofte. Vanliga er konsertin í Tivoli men varð flutt í ár vegna umvælingar.*

**Hetta vikuskiftið luttaka millum 45 og 50 violinnæmingar, á skeiði í violinspæli. Næmingarnir eru í aldrinum 6 til 20 ár, og hava allir fingið violinfrálæru eftir Suzuki háttinum**

*Orð: Niels Uni Dam*
*Myndir: Eyðun Müller Thomsen*

Skeiðið endar við eini konsert í Vesturkirkjuni sunnudagin, har verkætlanin, sum violinleikararnir hava arbeitt við hetta vikuskiftið, verður framførd.

### Serkønir gestalærarar

Gestalærarar eru hjúnini Béla og Tove Detreköy. Tað vóru tey, sum upprunaliga byrjaðu at skipa Suzuki frálæru í Føroyum í 1996. Hetta var 24 ár eftir, at tey byrjaðu at skipa Suzuki frálæru í Danmark.

Béla og serliga Tove hava útbúgvið føroysku Suzuki lærararnar Sámal Petersen og Anette Nielsen. Tove ferðaðist fyrstu árini nógv til Føroyar, í sambandi við útbúgvingina, og Sámal og Anette ferðaðust somuleiðis til Danmarkar, og at endans til Belgia í sambandi við próvtøkuna.

### 60 Suzuki næmingar

Í løtuni eru 60 næmingar í Føroyum, sum fáa frálæru eftir Suzuki háttinum. Tann elsti av næmingum, hevur verið við síðan frálæran byrjaði í Føroyum. Hann er nú 20 ár, og er sloppin inn á klassiska konservatoriið í Keypmannahavn.

### Ungari

Béla er ungari, og byrjaði 6 ára gamal at spæla violin. Evnini vóru stór, og hann fór undir lesna í tónlist. 19 ára gamal, varð hann innkallaður í ungarska herðin, og luttók í seinna heimsbardaga. Tá kríggi varð av, var hann staddur í Danmark. Hann settið búgv har. Arbeiðið fekk hann á kongaliga kapellinum, og skjótt hitti hann Tove, sum hann giftist og fekk børn við.

### Føroyavinir

Tey gjørdust væl við klaverleikaran Mogens Wahl. Tá hesin fór til Føroyar at verða Ríkisumboðsmaður, hildu tey sambandið. Í 1962 fóru Béla og Tove saman, við einum vinmanni, ungaranum Georg Vasarheli, til Føroyar at vitja ríkisumboðsmannin.

Teimum dámdu væl í Føroyum. Béla og Tove avgjørdu at flyta til Føroyar í november 1966. Hesa tíðina stjórnaðu tey Kamarorkestrinum, m.a. á eini útvarpskonsert úr Auluni á Kommunuskúlanum í Havn.

### Suzuki við úr Amerika

Í apríl 1967, fluttu tey til USA, har tey gjørdust kunnug við Suzuki frálæruna. Tá tey í 1972 fluttu aftur til Danmarkar, fóru tey undir frálæru eftir hesum leisti.

Béla var fleiri ár lærari á konservatoriinum í Odense, og har hevði hann millum onnur Sámal Petersen sum næming.

Gamli vinmaðurin Ólavur Hátún, bað í 1996 Béla og Tove koma til Føroyar í 1996, at hjálpa til við at leggja Suzuki frálæru til rættis. Hetta gjørdu tey fegin í samstarvið við Sámal.



*Børnini fáa gott í beinið. Her framførsla í Keypamannahavn, har Bela eisini varð hjástæddur*

### Farin um tey 80

Hjúnini eru farin um tey 80, og hóast tey ikki arbeiða líka nógv sum fyrr, so hava tey enn frálæru í violin eftir Suzuki háttinum.

Tey gleða seg til at sleppa til Føroyar aftur, men tað er við sorgblídni, tí nógv av gomlu vinfólkunum er deyð. Tað heldur Béla verða eitt sindur syrgiligt. Alt ov nógv fólk doyggja ov tíðliga, helt hann fyri.

### Um Suzuki frálæru

Suzuki frálæran eru ein háttur at læra at spæla eitt ljóðføri, sum Dr. Shin'ichi Suzuki menti miðskeiðis í seinastu øld. Frálæran tekur støðið í innlæring av móðurmáli hjá børnum. Flestu børn læra móðurmálið uttan trupulleikar. Suzuki var sannførdur um, at við rættari frálæru, kunnu øll børn læra at spæla eitt ljóðføri.

Í frálæruni verður dentur lagdur á, at børnini byrja tíðliga at spæla ljóðførið. Ljóðføri í barnastøddum verða brúkt. Fyrstu tíðina læra børnini tónleikin av at hoyra hann, heldur enn at lesa nótar.

Børnini spæla nógv í bólkum, og hava javnan framførslur, nógv verður gjørt fyri at tað skal verða stuttligt at spæla tónleik.

Suzuki hátturin snýr seg um samstarv, og um at stuðla hvør øðrum, heldur enn at kappast.

Foreldur eru eisini ein sera stórur partur av frálæruni. Foreldur eiga at luttakað í venjingini, og at fáa innlit í hvussu barnið eigur at venja. Hvønn dag eiga foreldrini at verða saman við barninum, meðan tað venur.

*Kelda: www.wikipedia.com*



*Ungarin Bela saman við donsku konuni Tove. Tey eru júst fylt 80 ár bæði og eru "still going strong". Tey koma til Føroya á Hvítusunnu at skipa fyri skeiði í tónleiki*